FØROYA POLITI

# FØROYA POLITI

## Hagtøl 2023

# Innihaldsyvirlit

Fororð ..... 1
1.Yvirskipað ..... 3
2.Revsilóg ..... 5
3. Serlógir ..... 14
4. Ferðslulógin ..... 15
5. Rúsevnisbrotsverk ..... 16
6. Unglingamisbrot ..... 18
7. Annað politiarbeiði ..... 20

FØROYA POLITI

# Fororð

Tað er við stoltleika og nøgdsemi, at eg eri við til at leggja fram nýggju hagtølini um arbeiðið hjá Føroya Politi, sum góðar kreftir hava lagt nógv fyri at menna.

Hagtøl eru bert áhugaverd og gagnlig, um tey siga nakað um samband og menning. Vit í Føroya Politi eru komin til ta niðurstøðu, at mátin vit hava gjørt hagtøl uppá bert hevur verið gagnligur og áhugaverdur í avmarkaðan mun. Tí er tað okkara vón, at hetta nýggja sniðið í størri mun lýkur krøvini og kemur bæði okkara virksemi og virkseminum hjá øðrum myndugleikum til góðar.

Hagtølini eru smá, og broytingar, sum kunnu tykjast sera týðandi, eru ikki neyðturviliga hagtalsliga týðandi, fyrr enn henda broyting verður endurtikin í seinni hagtølum. Eitt dømi um hetta, er munandi minkingin í fráboðanum um harðskap frá 2022 til 2023, sum er lýst eitt sindur longri niðri í tekstinum.

Um vit hyggja at hagtølunum, eru nakrar minkingar, ið eg haldi eru verdar at leggja til merkis.

Tað er týdningarmikið at leggja dent á, at tølini í høvuðsheitum eru grundað á talið av fráboðanum, sum politiið hevur móttikið. Tískil vísa hagtølini ikki, hvussu stórur partur av hesum fráboðanum hava elvt til skuldsetingar ella ákærur. Tó undantikið unglingamisbrot, har tølini eru grundað á skuldsetingar.

Yvirskipað vísa tølini ein vøkstur í samlaða talinum av fráboðanum sambært revsilógini, ferðslulógini og øðrum serlógum. Frá 2019 til 2023 vaks talið av fráboðanum við 14%, hóast talið var lægri í 2023 í mun til 2022. Samstundis hevur, í sama 5 ára tíðarskeiði, verið ein týðandi vøkstur á 32% í talinum av handtøkum. Handtøkurnar vóru tær lægstu í 2020, sum helst er avleiðing av COVID-19 farsóttini og tilhoyrandi stongslunum, serliga av náttarlívinum, umframt avmarkað ferðing og harvið minni smugling av rúsevnum. Hóast vøksturin í handtøkum, hevur talið av varðhaldsfongslingum verið lutfallsliga støðugt hetta tíðarskeiðið.

Hyggja vit at brotum á revsilógina, hevur talan verið um ein vøkstur á 44% í tíðarskeiðnum 2019-2023, har vøksturin í høvuðsheitum hevur verið innan fyri ríkingarbrotsverk og kynslig brotsverk.

Hagtølini vísa eisini, at talið av fráboðaðum neyðtøkum er vaksið úr 10 í 2019 til 30 í 2023, har tað í 2022 vóru heili 32 fráboðanir. Í tíðarskeiðnum 2020-2023 var upp móti helmingurin av ofrunum undir 18 ár, tá brotsverkið varð framt, har tað í 2019 var null.

Í mun til harðskapsmál, herundir dráp, drápsroynd og óviljað manndráp, er skrásettur ein vøkstur í fráboðanum frá 2020 til 2022 og síðani ein lækking á 23% í 2023. Harumframt vísa tølini, at flestu harðskapsbrotsverk fara fram um náttina í vikuskiftinum.

Rúsevnisbrotsverk í Føroyum hava verið vaksandi seinastu 7-8 árini, hóast talið av fráboðanum ikki endurspeglar hesa gongdina. Tað vísir seg ofta at vera eitt skipað umhvørvi, har málini eru vorðin meira umfatandi og torgreidd í mun til bert fyri nøkrum fáum árum síðani.

Unglingabrotsverk, har gerningsmaðurin hevur verið millum 15-17 ár, tá brotsgerðin varð framd, eru fallin úr 193 skuldsetingum til 117 skuldsetingar í tíðarskeiðnum frá 2019 til 2023 undir teimum trimum lógarflokkunum: revsilógin, ferðslulógin og aðrar serlógir. Tað eru serliga brot á ferðslulógina, sum fylla í hagtølunum, har ein stórur partur hevur við prutlkoyring at gera. Harafturat hevur verið ein týðandi lækking á 71% í skuldsetingum eftir revsilógini í 2023 í mun til árið fyri. Hettar er serliga galdandi fyri innbrot, stuldur og harðskap.
Politiið hevur eisini eina røð av øðrum uppgávum, sum ikki neyðturviliga eru beinleiðis knýttar at umsitingini av lógum. Ein týðandi partur av dagliga arbeiðinum hjá politinum snýr seg um at taka sær av fólki, ið eru sjúk/hjálparsleys ella sum á annan hátt hava tørv á hjálp, m.a. rúsdrekkaávirkaði, og sum tað verður víst á í kapittul 7, eru hesi tøl vaksandi.

Viðmerkjast skal, at málsviðgerðarskipanin hjá Føroya Politi, NIFLHEIMR, ikki stuðlar undir hagtalsframleiðslu. Tølini skulu tí lesast við ávísum fyrivarni og tí óvissu, sum tey eru heft at. Harumframt eru virðir, sum telja færri enn trý, víst sum *.

Við vón um góðan og gevandi lesnað.

Michael Boolsen

Føroya Landfúti

# 1. Yvirskipað

## Revsilógin, ferðslulógin og aðrar serlógir

1.1 Samlað tal av fráboðanum eftir revsilógini, ferðslulógini og øðrum serlógum í tíðarskeiðnum 2019-2023




## Tal av handtøkum og varðhaldsfongslaðum

1.2 Handtøkur, býtt á kyn í tíðarskeiðnum 2019-2023



1.3 Tal av varðhaldsfongslaðum í tíðarskeiðnum 2019-2023



# 2. Revsilóg

**Yvirskipað**

2.1 Tal av fráboðanum eftir revslilógini í tíðarskeiðnum 2019 - 2023




2.2 Tal av fráboðanum eftir revsilógini pr. 1000 íbúgvar samanborið við Grønland (kriminalloven) og Danmark (straffeloven)

| Ár | Føroyar | Danmark | Grønland |
|---|---|---|---|
| 2023 | 13,8 | 48,3 | 79,4 |
| 2022 | 11,8 | 47,8 | 76,3 |
| 2021 | 10,3 | 44,3 | 83,8 |

## 2.3 Tal av fráboðanum eftir revsilógini pr. bý/bygd

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | 318 | 281 | 320 | 403 | 464 |
| Klaksvík | 46 | 44 | 41 | 39 | 60 |
| Miðvágur | 23 | 18 | 5 | 14 | 32 |
| Sørvágur | 15 | 7 | 18 | 13 | 28 |
| Tvøroyri | 3 | 15 | 11 | 20 | 20 |
| Vágur | 7 | 16 | 11 | 16 | 10 |
| Vestmanna | 7 | 12 | 7 | 23 | * |
| Fuglafjørður | 8 | 7 | 17 | * | 8 |
| Leirvík | 6 | 13 | 4 | 3 | 10 |
| Saltangará | 4 | 10 | 8 | 5 | 8 |
| Runavík | 8 | 3 | * | 9 | 12 |
| Sandavágur | 4 | 9 | 7 | 3 | 6 |
| Toftir | 3 | 5 | 4 | * | 8 |
| Kollafjørður | 3 | 7 | * | 6 | 4 |
| Øvrige bygder | 69 | 110 | 95 | 82 | 81 |

## 2.4 Fráboðanir býtt á útvald brot á revsilógina

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Harðskapsbrotsverk, herundir dráp** | | | | | |
| Harðskapur, herundir dráp, drápsroynd og óviljað manndráp | 87 | 81 | 112 | 122 | 94 |
| Hóttanir um harðskap | 41 | 59 | 57 | 40 | 35 |
| **Kynslig brotsverk** | | | | | |
| Neyðtøka | 10 | 10 | 14 | 32 | 30 |
| Barnapornografi, og annað kynsligt samband við barn u.15 ár | 7 | 13 | 15 | 28 | 69 |
| Onnur siðamisbrot, herundir blunisbrot og kynslig misnýtsla | 27 | 44 | 50 | 53 | 80 |
| **Ríkingarbrotsverk** | | | | | |
| Innbrot | 23 | 25 | 21 | 45 | 46 |
| Stuldur | 115 | 88 | 67 | 94 | 117 |
| Handilsstuldur | 13 | 19 | 20 | 26 | 31 |
| Brúksstuldur | 20 | 21 | 20 | 18 | 17 |
| Búskaparlig brotsverk - fíggjarsvik, heimildarsvik o.a. | 33 | 22 | 27 | 33 | 85 |
| Rán | * | 0 | 4 | * | 0 |
| **Herverk** | 108 | 127 | 106 | 100 | 95 |

2.5 Útviklingin av fráboðanum eftir revsilógini í tíðarskeiðnum 2019-2023




2.6 Sløg av fráboðanum eftir revsilógini í 2019 og í 2023



**Harðskapur**

2.7 Fráboðanir um harðskapsbrotsverk, herundir dráp, drápsroynd og óviljað manndráp í tíðarskeiðnum 2019-2023




2.8 Fráboðanir um hóttanir um harðskap í tíðarskeiðnum 2019-2023



2.9 Gerðarløta fyri harðskapsbrotsverk, herundir dráp, drápsroynd og óviljað manndráp, 2023




2.10 Fráboðanir um harðskapsbrotsverk pr. 1000 íbúgvar samanborið við Danmark og Grønland

| Ár | Føroyar | Danmark | Grønland |
|---|---|---|---|
| 2023 | 1,9 | 3,9 | 22,9 |
| 2022 | 2,4 | 4,4 | 21,0 |
| 2021 | 2,4 | 3,7 | 25,9 |

Tølini fevna eisini um harðskapshóttanir móti persónum í almennum stravi

## Kynslig brotsverk

2.11 Fráboðanir um kynslig brotsverk í tíðarskeiðnum 2019-2023




2.12 Fráboðanir um kynslig brotsverk pr. 1000 íbúgvar samanborið við Danmark og Grønland í tíðarskeiðnum 2021-2023

| | Føroyar | Danmark | Grønland |
|---|---|---|---|
| 2023 | 3,3 | 1,8 | 10,9 |
| 2022 | 2,1 | 1,8 | 11,8 |
| 2021 | 1,5 | 1,5 | 11,8 |

2.13 Sløg av kynsligum brotsverkum í 2019 og í 2023




2.14 Prosentpartur av fráboðanum um neyðtøku í tíðarskeiðnum 2019-2023, har órættaði hevur verið undir 18 ár, tá brotið varð framt.



## Ríkingarbrotsverk

2.15 Fráboðanir um ríkingarbrotsverk í tíðarskeiðnum 2019-2023




2.16 Sløg av ríkingarbrotsverkum, 2023



2.17 Sløg av innbrotum, 2023




2.18 Fráboðanir um innbrot pr. 1000 íbúgvar samanborið við Danmark og Grønland

| Ár | Føroyar | Danmark | Grønland |
|---|---|---|---|
| 2023 | 0,8 | 5,3 | 7,5 |
| 2022 | 0,8 | 5,3 | 6,4 |
| 2021 | 0,4 | 5,2 | 8,3 |

FØROYA POLITI

# 3. Serlógir

3.1 Fráboðanir um brot á serlógir í tíðarskeiðnum 2019-2023




3.2 Sløg av brotum á serlógir í tíðarskeiðnum 2019-2023

| Sløg av brotum á serlógir | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lóggáva um rúsandi evni | 122 | 138 | 134 | 122 | 107 |
| Útlendingalógin (ólógligt arbeiði, innferðarforboð, ólógligt uppihald) | 73 | 92 | 104 | 314 | 206 |
| Vápnalógin | 45 | 46 | 48 | 22 | 11 |
| Skilhaldsreglur/Ordensbekendtgørelse | 66 | 55 | 62 | 82 | 78 |
| Náttúruverndarlógin | 72 | 77 | 91 | 77 | 64 |
| Aðrar fráboðanir um serlógina* | 210 | 159 | 482 | 207 | 233 |

*Onnur brot á serlógina: Rættargangslóg, lógir viðv. burturvísing, forboð og tilhald, fýrverkslógin, umhvørvislógin, hundalógin, grindalógin, arbeiðsumhvørvislóg o.a.

# 4. Ferðslulógin

## 4.1 Fráboðanir um brot á ferðslulógina í tíðarskeiðnum 2019-2023




## 4.2 Sløg av brotum á ferðslulógina í tíðarskeiðnum 2019-2023

| Sløg av brotum á ferðslulógina | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Ferðsluóhapp** | | | | | |
| V/materiellum skaða, v/persónsskaða | 24 | 29 | 20 | 26 | 27 |
| V/materiellum skaða, u/persónsskaða | 105 | 110 | 94 | 112 | 103 |
| U/materiellum skaða, v/persónsskaða | 0 | * | * | 3 | 0 |
| Rúsdrekka/rúsevniskoyring v/persónsskaða | 5 | 6 | 7 | 4 | * |
| Rúsdrekka/rúsevniskoyring u/persónsskaða | 20 | 28 | 25 | 24 | 24 |
| Ferðsluvanlukkur aðramáta | 31 | 25 | 33 | 21 | 17 |
| **Útvald brot á ferðslulógina** | | | | | |
| Rúsdrekka/rúsevniskoyring | 97 | 100 | 99 | 135 | 121 |
| Brek við bilinum | 278 | 182 | 114 | 144 | 212 |
| Koyring uttan førararætt | 97 | 91 | 98 | 108 | 105 |
| Koyring uttan at hava koyrikortið við sær | 136 | 117 | 98 | 80 | 117 |
| Brotið lógina um hámarksferð/bil | 519 | 632 | 591 | 667 | 514 |
| Brotið lógina um hámarksferð /prutl | 27 | 8 | 42 | 44 | 18 |
| Manglandi nýtsla av trygdarbelti | 107 | 105 | 117 | 101 | 109 |
| Manglandi nýtsla av trygdarútgerð til børn | 52 | 25 | 32 | 92 | 105 |
| Nýtsla av fartelefon undir koyring | 247 | 373 | 295 | 418 | 339 |
| Koyring í frátøkutíðini | 11 | 11 | 15 | 19 | 26 |
| Ávísingar ikki fylgdar | 4 | 8 | 20 | 10 | 16 |
| Serligar reglur fyri prutl og motorsúkklur | 25 | 7 | 18 | 8 | 9 |
| Manglandi brúk av fallhjálmi | 13 | 8 | 8 | 4 | * |
| Annað í ferðslulógini | 238 | 280 | 310 | 244 | 273 |

# 5. Rúsevnisbrotsverk

**Rúsandi evni**

5.1 Skrásett brot á lógir um rúsandi evni í tíðarskeiðnum 2019-2023




**Lagt hald á**

5.2 Mongd av hassj, ið hald er lagt á í tíðarskeiðnum 2019-2023



## 5.3 Mongd av kokain ið hald er lagt á í tíðarskeiðnum 2019-2023




## 5.4 Nøgdir av rúsevnum, sum politiið ella tollvaldið hava lagt hald á í tíðarskeiðnum 2010-2023

| | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hash (gr.) | 1.056,90 | 17.481,78 | 6.351,44 | 4.183,61 | 3.779,70 | 2.237,25 | 6.173,67 | 22.214,73 | 8.885,37 | 18.138,40 | 4.378,44 | 16.246,50 | 46.550,27 | 51.299,34 |
| Hasholja | | | | | | 166 gr. | 45,9 ml | 4 ml | | | 60 ml | | 25 ml | |
| Marihuana (gr.) | | | | | | | 1.034,57 | 61,65 | 27 | | | 1663 | 5,11 | 35,52 |
| MDMA (gr.) | | | 123,8 | | | 45 | 80,82 | 143,49 | 99,68 | 48,56 | 169,07 | 130,93 | 1,22 | 8 |
| Amfetamin (gr.) | 39,73 | 273,3 | 74,3 | 4,84 | 0,5 | 93,25 | 57,1 | | 218,2 | 982,6 | 10,03 | 1.907,39 | 9,47 | |
| Heroin (gr.) | | | | | | | 10,8 | | 1,3 | 0,2 | | | 4,88 | |
| Kokain (gr.) | 0,13 | | 1 | 0,52 | 0,8 | 3,13 | 22,9 | 24,3 | 1,13 | 47,97 | 58,08 | 3,79 | 21,8 | 1.583,99 |
| Ecstacy (stk.) | 1 | 5 | | | | 40 | 1 | 16 | | | 50 | | | |
| Skunk (gr.) | 395,2 | 2,95 | 31 | 572,58 | 44,61 | 65,47 | | | | 3,2 | | | | |
| Plantir | 36 | 56 | 213 | 358 | 86 | 37 | 152 | 23 | 92 | 7 | 11 | 26 | 73 | |
| Svampar | | 80 gr. | | 267 stk. | | 178,7 gr. | 1,85 gr. | 195,7 gr. | | 4,9 gr. | 207,75 gr. | 1.060,5 gr. | 16,7 gr. | |
| 6-APB (gr.) | | | | 2,3 | | | | | | | | | | |
| Ritalin (stk.) | | | 65 | 153 | 1 | 7 | 17 | 8 | 12 | 8 | 13 | 114 | 71 | 27 |
| Benzodiazepinir (stk.) | | | | | | | | | | | | | | 70 |
| 2C-B | | | | | | | | 28 stk. | | | 0,04 gr. | | | |
| LSD/frímerki (stk.) | | | | | | 4 | | 518 | 181 | 502,5 | 9 | 13,5 | 44 | 52 |
| DMT,tbl (stk.) | | | | | | 8 | | 2 | | | | | | |
| DMT (gr.) | | | | | | 250 | | | | | 352,04 | 28,85 | | |
| Morfin | | | | | | 20 ml. | 10 tab. | | | | 4 tab. | | 6 tab. | |
| THC-slikkipinnar (stk.) | | | | | | | | 17 | | | | | | |
| Metadon | | | | | | | | | | 20 mg. | | | | 26 stk. |
| GHB (gr.) | | | | | | | | | | | 34,3 | 14,28 | | |
| Ketamin (gr.) | | | | | | | | | | | 0,81 | 242,47 | | |
| Ibogain (stk.) | | | | | | | | | | | 10 | | | |
| fentanyl-plástur (stk.) | | | | | | | | | | | 2 | | | |
| Changa (gr.) | | | | | | | | | | | | | 12,98 | |
| Aðrar tablettir (stk.) | | | | | | | | | | | | | 25 | |

# 6. Unglingamisbrot

**Skuldsetingar har brotsfólkið er 15-17 ár**

6.1 Skuldsetingar sambært revsilógini, ferðslulógini og øðrum serlógum í tíðarskeiðnum 2019-2023




6.2 Gongdin í aldursbýtinum av fráboðanum eftir revsilógini í tíðarskeiðnum 2019-2023



6.3 Aldursbýtið fyri brotsfólk, ið eru skuldsett eftir revsilógini, 2023




6.4 Sløg av skuldsetingum eftir revsilógini, 2023



# 7. Annað politiarbeiði

## 7.1 Fráboðanir um húsaófrið og rúsdrekkaávirkað í tíðarskeiðnum 2019-2023




## 7.2 Fráboðanir um sjúk/hjálparsleys, umframt tvingsilsinnleggingar í tíðarskeiðnum 2019-2023



FØROYA POLITI

## 7.3 Útvaldir flokkar av øðrum politiuppgávum

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Órógv og óskil | 214 | 198 | 212 | 180 | 267 |
| Burturvísing av óynsktum persóni | 60 | 71 | 42 | 40 | 50 |
| Hjálpa øðrum almennum myndugleika | 42 | 39 | 46 | 37 | 69 |
| Frávera frá at sita revsing | 25 | 18 | 16 | 27 | 25 |
| Kunngeringar (forkyndelser) | 682 | 597 | 411 | 387 | 422 |
| Framførsla fyri annan myndugleika | 226 | 250 | 183 | 257 | 240 |
| Marknaeftirlit á flogvøllinum | 219 | 573 | 122 | 175 | 218 |
| Marknaeftirlit við havnir | 68 | 61 | 12 | 69 | 103 |